KRINGVARP
FØROYA

# Ársfrásøgn 2022

# Innihaldsyvirlit

Síða


UPPLÝSINGAR UM STOVNIN 2

ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR 3

GRANNSKOÐANARÁTEKNING 4

LEIÐSLUFRÁGREIÐING 6

NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR 9

RAKSTRARROKNSKAPUR 2021, KRINGVARP FØROYA 13

FÍGGJARSTØÐA TANN 31. DESEMBER 2021, KRINGVARP FØROYA 14

NOTUR 15

# Upplýsingar um stovnin

Kringvarp Føroya
Norðari Ringvegur
100 Tórshavn

Roknskaparár: 1. januar – 31. desember

## Kringvarpsstýri

Rógvi Olavson (formaður)
Mathea Hilduberg (næstforkvinna)
Annika Eidesgaard
Gunvá við Keldu
Høgni Reistrup
Michael Koba
Finnur Koba

## Stjórn

Ivan Hentze Niclasen
*stjóri*

## Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
FO-100 Tórshavn

# Roknskaparátekning leiðslunnar

**Stýrið og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina fyri 2022 fyri Kringvarp Føroya.**

Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o. t."

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin í øllum týðandi lutum er í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o. t.".

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn hin 22. juni 2023

Stjórn:

Ivan Hentze Niclasen
*stjóri*

Stýrið:

Rógvi Olavson
*formaður*

Mathea Hilduberg
*næstforkvinna*

Annika Eidesgaard

Gunvá við Keldu

Høgni Reistrup

Michael Koba

Finnur Koba

KRINGVARP FØROYA

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

## *Til kringvarpsstýrið*

## *Grannskoðanarátekning á ársroknskapin*

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Kringvarp Føroya fyri roknskaparárið 1. januar– 31. desember 2022 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, íroknað nýttan roknskaparhátt.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í tráð við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Tað er somuleiðis okkara fatan, at tað eru settar á stovn mannagongdir og innanhýsis eftirlit, sum stuðla undir, at tær avgerðir, sum eru fevndar av ársroknskapinum eru í tráð við lógir og aðrar reguleringar og við gjørdar avtalur og vanliga siðvenju.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini og eisini "Løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum vm. og góðum almennum grannskoðanarsiði. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av stovninum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum krøvum og reglum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ein ársroknskap uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt stovnurin megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur aðrar ætlanir við stovninum.

### Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðaraátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum umframt góðum almennum grannskoðanarsiði altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparabrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum umframt góðum almennum grannskoðanarsiði, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaða dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.
- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.
- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.
- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera roknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt stovnurin megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðaraátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til broytingar í hesum viðurskiftum.
- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Grundað á gjørda arbeiðið, er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 22. juni 2023

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
*statsaut. revisor*

# Leiðslufrágreiðing

Kringvarp Føroya hevur sambært kringvarpslógini skyldu til at kringvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Í programmvirkseminum skal Kringvarp Føroya leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

Í public service sáttmála millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið eru almennu skyldur Kringvarpsins nágreinaðar. Sáttmálaskeiðið fyri síðsta Public Service sáttmálan endaði við árslok 2020. Enn er ikki greitt, nær nýggjur sáttmáli verður undirskrivaður.

## Inntøkur

Inntøkurnar lækkaðu 0,7 mió.kr. í mun til árið fyri, úr 74,8 mió.kr. niður í 74,1 mió.kr.

| Inntøkur kr. | 2022 | 2021 | munur |
|---|---|---|---|
| Kringvarpsgjald | 66.986.812 | 65.750.925 | 1.235.887 |
| Útvarpskunngerðir | 2.250.900 | 1.869.760 | 381.140 |
| Spæl, netto inntøka | 4.112.658 | 5.234.916 | -1.122.258 |
| Ískoytisveitingar | 90.000 | 130.000 | -40.000 |
| Annað | 704.394 | 1.864.787 | -1.160.393 |
| **Inntøkur til samans** | **74.144.764** | **74.850.388** | **-705.624** |

Áhaldandi fólkavøkstur hevur givið fleiri inntøkur frá kringvarpsgjaldi, og í 2022 var ein hampiliga góð framgongd í kunngerðarinntøkunum.

Í 2022 varð sum heild minni brúkt til rakstur og íløgur enn árið fyri, og tí var minni brúkt av støðlaðum spæliinntøkum. Samsvarandi roknskaparvegleiðingini um fremmanda fígging verða inntøkur frá eydnuspølum bert tiknar við í raksturin í tann mun, tær verða nýttar til at fíggja virksemi í árinum.

Aðrar inntøkur í 2022 stava í høvuðsheitinum frá virksemi knýtt at framleiðslu av altjóða fótbóltslandsdystum í samstarvi við FSF, og um afturbering í samband við uppgávurnar, sum standast av at vera alment móttøkustað til bæði fólkatings- og løgtingsvalið.

# Leiðslufrágreiðing

## Útreiðslur

Framleiðandi og stuðlandi deildirnar vóru samanlagt 0,6 mió.kr. bíligari at reka enn árið fyri. Sparingarnar, sum vórðu framdar á sumri 2021, síggjast týðuliga í roknskapartølunum fyri 2022. Hóast sáttmálabundnar lønarhækkingar umframt vanligar príshækkingar á vørum og tænastum minkaðu beinleiðis útreiðslurnar til framleiðslu samanborið við árið fyri.

| Útreiðslur kr. | 2022 | 2021 | munur |
|---|---|---|---|
| Beinleiðis útreiðslur: | | | |
| Aktuelt | 14.540.052 | 14.594.387 | -54.335 |
| Heimasíða | 1.827.087 | 1.299.542 | 527.545 |
| Starvslesandi | 0 | 0 | 0 |
| Mentan | 15.894.911 | 16.489.736 | -594.825 |
| Tøknideildin (framleiðsla) | 13.597.029 | 14.099.916 | -502.887 |
| Beinleiðis útreiðslur til samans | 45.859.079 | 46.483.581 | -624.502 |
| | | | |
| Óbeinleiðis útreiðslur: | | | |
| Umsiting og felagsútreiðslur | 7.263.378 | 7.131.959 | 131.419 |
| Tøknideildin (ikki framleiðsla) | 12.866.906 | 12.625.138 | 241.768 |
| Rættindi | 4.061.302 | 4.416.544 | -355.242 |
| Óbeinleiðis útreiðslur til samans | 24.191.586 | 24.173.641 | 17.945 |
| | | | |
| **Útreiðslur til samans** | **70.050.665** | **70.657.222** | **-606.557** |

Afturat hesum koma íløgur, avskrivingar og fíggjarpostar, og ársúrslitið fyri 2022 er eitt avlop upp á 0,9 mió.kr. Sambært løgtingsfíggjarlógini fyri 2022 skal Kringvarp Føroya hava eitt rakstraravlop upp á 0,9 mió.kr. til at fíggja digitaliseringsverkætlanina Savnsgull.

Samanumtikið kann sigast, at úrslitið hjá Kringvarpi Føroya fyri 2022 var gott.

## Hendingar í árinum

Kringvarp Føroya arbeiðir støðugt við at menna um framleidni. Aftaná spariumfarið í 2021 vaks talið av føroyskum senditímum aftur í 2022. Sveiggj á inntøkusíðuni geva tó ávísar avbjóðingar. Í mong ár hevur tað verið ein sannroynd, at Kringvarpið ikki kann dúva uppá kringvarpsgjaldið aleina. Tá inntøkurnar frá Gekkinum minkaðu av álvara í 2021, framdu vit broytingar í gekkaspælinum í 2022. Átøkini eydnaðust. Inntøkurnar frá Gekkinum í 2022 vóru á leið 10 mill. kr., meðan tær vóru 3,2 mill. kr. árið fyri. Broytta gongdin vaks aftur nakað um upphæddina av støðlaðum gekkainntøkum.

# Leiðslufrágreiðing

## Framtíðin

Gongdin við inntøkunum vísti enn einaferð, at raksturin er viðbrekin, tá hann er tengdur at sveigginum í einum eydnuspæli. Tí hevur boðskapurin í samgonguskjalinum hjá landsstýrinum, um at Kringvarpið skal styrkjast, so stóran týdning. Kringvarpið hevur áður víst á, at tað hevur alstóran týdning, at ein prístalsjavning verður sett í gildi fyri kringvarpsgjaldið, soleiðis at hækkandi lønir og prísir ikki niðurlaga stovnin.

Ætlanin hjá landsstýrinum um at styrkja Kringvarpið og miðlalandslagið sum so, gevur eisini vón um ein miðlapolitikk, sum byggir á framsøknan mentanarpolitikk. Á ráðstevnu, sum Kringvarpið skipaði fyri í 2022, kom fram, at yvir 100 størv eru horvin í føroyska miðlalandslagnum tey seinastu 15 árini. Samstundis hevur ovurstóra útboðið frá altjóða tøknirisunum broytt miðlavanarnar munandi. Tað er eyðsæð, at tá vit brúka minni tíð uppá føroyskar miðlar verður minni kjakast um føroyska samfelagið og mentanina. Føroyska savningarmegin kann tískil vikna.

Tað er okkara vón, at hesi viðurskifti fáa eina gjølliga umrøðu og viðgerð, tá orðaskifti væntandi verður um ein nýggjan public service-sáttmála í Løgtinginum í heyst.

# Nýttur roknskaparháttur

### Inngangur

Ársfrásøgnin fyri Kringvarp Føroya fyri 2021 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár.

Roknskapurin umfatar stovnsnummar 148070 hjá Kringvarp Føroya. Afturat hesum stovns-nummarið er játtan í fíggjarlógini til stovnsnummar 153920 Talgilding av bandasavninum og 154780 Lýsingarinntøkur.

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur og útreiðslur

Inntøkur og útreiðslur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, verða skrásettar, tá ið tær eru latnar.

Í teimum førum, tá útreiðslur ella inntøkur ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, verða tær skrásettar, so skjótt upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður. Ein upphædd kann gerast upp, um eitt rættarligt krav eftir eini væl greinaðari upphædd kann gerast galdandi. Um eitt munandi krav, sum er til eitt ávíst fíggjarár, ikki kann gerast endaliga upp, áðrenn roknskaparárið er lokið, verður upphæddin skrásett á einari rakstrarkontu í roknskapinum fyri tað fíggjarárið, grundað á eina meting, soleiðis at upphæddin verður rættað í tí fíggjarári, tá ið kravið endaliga kann verða gjørt upp.

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapar tíðarskeiði, ið hesar viðvíkja. Allar útreiðslur eru uttan meirvirðisgjald.

### Inntøkur av eydnuspølum

Spæliinntøkur verða viðgjørdar sum fremmand fígging sambært § 13, stk. 5 í roknskapar-kunngerðini. Skipanin við fremmandu fíggingini av spæliinntøkum hjá Kringvarpinum virkar á tann hátt, at tað sum er eftir at fíggja – tá ið hædd er tikin fyri vanligu inntøkunum frá kringvarpsgjaldi kunngerðum o.ø., og møguligari játtan – verður fíggjað av fremmandu fíggingini, um upphædd er á kontuni, sum verður tikin við á fíggjarstøðuni undir skuld. Uppsparda upphæddin til fremmanda fígging kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum, og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum.

# Nýttur roknskaparháttur

Fremmanda fíggingin er tískil ein restfígging, sum er treytað av tveimum viðurskiftum:

1. At fígging vantar í til raksturin av Kringvarpinum, tá ið ársins kringvarpsgjald, aðrar inntøkur og møgulig játtan eru nýttar. Í hesum liggur eisini, at vanligu inntøkurnar og játtan ikki kunnu samansavnast á kontu fyri fremmandari fígging á fíggjarstøðuni.

2. At spæliinntøkur eru tøkar á fíggjarstøðuni, t.v.s. at tað er ein uppspard upphædd á fíggjarstøðuni til fremmanda fígging. Kringvarpið má tí taka við, hvussu stórar samansavnaðu tøku spæliinntøkurnar eru og væntandi verða, tá ið fleirársætlanir fyri virksemið verða lagdar. Tað kann ongantíð verða flutt meira til raksturin av kontu fyri fremmandari fígging, enn upphæddin á kontuni, t.v.s. at kontan fyri fremmanda fígging ongantíð kann koma í trot.

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Íløgur og størri viðlíkahald, sum er ein betring av verandi støðisogn, verður eins og vanligt viðlíkahald útreiðsluført í rakstrarroknskapinum.

Materiell støðisogn, hvørs keypsvirði er yvir 50 tkr., verður skrásett sum materiell støðisogn og ein samsvarandi mótkonta verður skrásett beinleiðis undir eginognini. Materiella støðisognin verður upptikin til kostprís við frádrátti av avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði:

| | Brúkstíð |
|---|---|
| Bygningar | 50 ár |
| Tøkniligur útbúnaður | 3-10 ár |
| Akfør | 7 ár |

Avskrivingarnar hava onga ávirkan á raksturin, við tað at talan er um tekniskar avskrivingar.

Niður- ella uppskrivingar av skrásettari materiellari støðisogn verða skrásettar, um tað kann staðfestast, at roknskaparliga virðisbroytingin á støðisognini er varandi. Talan er um eina roknskaparliga skráseting, sum ikki ávirkar rakstrarroknskapin.

Støðisogn í gerð verður ikki skrásett í ársroknskapinum. Samlaða íløgan verður í staðin skrásett sum tilgongd, tá materiella støðisognin er liðug og tikin í brúk.

# Nýttur roknskaparháttur

## Goymsla

Eins og undanfarin ár, er virðið á vørugoymsluni ikki tikið við á goymslukontu í fíggjarstøðuni, við tað at játtanarheimild ikki er til tess.

## Vøru- og tænastuáogn

Vøru- og tænastuáogn verður virðisásett til amoritseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum. Upphæddirnar eru mettar hvør sær.

Áogn frá kringvarpsgjaldi hjá kommunum er innroknað í ársroknskapin sum ein áogn, grundað á staðfesta inntøku av kringvarpsgjaldi frá kommunum árið fyri.

## Onnur áogn

Onnur áogn fevnir um meirvirðisgjald og ymsar tíðaravmarkingar.

## Millumrokningar

Millumrokningin við Gjaldstovu Føroya verður virðisásett til áljóðandi virði.

## Onnur skuld

Onnur skuld verður virðissett til nettorealisatiónsvirði og fevnir um skyldugar vinningar í sambandi við spøl, afturhildnan skatt í sambandi við spøl, skyldugan starvsfólkakostnað og annan skyldugan kostnað.

Skyldug avspáking hjá starvsfólkum er innroknað sum ein skylda í ársroknskapinum eftir uppgerð av tilgóðahavandi og skyldugum tímum hjá hvørjum starvsfólki sær, hóast meginregluna í rundskrivinum um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum frá 18. desember 2017, um at tímasaldur skulu tíðaravmarkast, tá ið starvsfólkið eigur fleiri enn 40 tímar ella skyldar fleiri enn 30 tímar.

# Nýttur roknskaparháttur

## Støðlað avlop

Støðlað avlop verður virðissett til nettorealisatiónsvirði og fevnir um avlop frá eydnuspølum.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan meta, at spæliinntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya kunnu sammetast við fremmanda fígging, sambært §13, stk. 5 í roknskaparkunngerðini:

> Inntøkur av verkætlanum o. t. - sum rætturin til at taka ímóti, er treytaður av, at ávíst virksemi verður framt - verða tiknar við sum inntøka so hvørt, sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið.

Uppspard upphædd frá fremmandari fígging kann verða samansavnað eftir einum ella fleiri árum, og kann nýtast eftir einum ella fleiri árum.

## Avsettar skyldur

Avsettar skyldur verða tiknar við í ársroknskapin, tá ið ein bindandi hending er farin fram, og skyldan er sannlík, men óvist er, nær upphæddin fellur til gjaldingar, ella hvussu stór upphæddin er. Nýtslan av avsettum skyldum verður javnað, tá ið skyldan kann gerast endaliga upp, og skyldan verður útint.

Samsvarandi nýttum roknskaparhátti í landsroknskapinum verða skyldugar starvsfólkaskyldur ikki tiknar við í ársroknskapin uttan so, at tað ikki er óvist, nær upphæddin fellur til gjaldingar og hvussu stór upphæddin er. Skyldug avspáking verður tikin við sum ein skylda undir aðrari skuld.

# Rakstrarroknskapur 2022, Kringvarp Føroya

**KRINGVARP FØROYA**

*Upphæddir í kr.*

| Nota | | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 74.144.764 | 74.850.388 |
| 2 | Framleiðandi deildir | -45.859.079 | -46.483.581 |
| 3 | Stuðlandi deildir | -20.130.284 | -19.757.097 |
| 4 | Annar kostnaður | -4.061.302 | -4.416.544 |
| | **Úrslit áðrenn rentur, avskrivingar og íløgur** | **4.094.100** | **4.193.166** |
| | Íløgur og størri viðlíkahald | -2.678.106 | -3.144.768 |
| | Avskrivingar og avsetingar av skuldarum | -492.721 | -128.726 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **923.274** | **919.672** |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 0 | 0 |
| | Aðrir fíggarligir kostnaðir | -23.274 | -19.672 |
| | **Ársúrslit** | **900.000** | **900.000** |

Løgtingsfíggjarlógin fyri 2022 áleggur Kringvarpi Føroya at hava eitt rakstraravlop upp á 900 tkr., sum skal brúkast til at fíggja digitaliseringsverkætlanina Savnsgull.

**Rakstrarroknskapur fyri Savnsgull sambært búskaparskipan landsins (BSL)**

| *Upphæddir í kr.* | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Lønir v.m | -1.184.710 | -1.172.858 |
| Keyp av vørum og tænastum | -45.452 | -217.284 |
| Keyp av útbúnaði | -5.087 | -17.166 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | -3.582 | -8.320 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | 27.352 | 401.697 |
| Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar | 311.518 | 113.931 |
| **Ársúrslit** | **-899.961** | **-900.000** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2022, Kringvarp Føroya

KRINGVARP FØROYA

| Nota | OGN | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | Grundøki | 3.683.768 | 3.683.768 |
| | Bygningur | 20.530.047 | 21.115.910 |
| | Tøkniligur útbúnaður | 5.752.249 | 6.704.178 |
| | Akfør | 403.412 | 615.494 |
| | **Materiel støðisogn til samans** | **30.369.475** | **32.119.350** |
| | | | |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 21.291.989 | 10.718.263 |
| 5 | Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 2.908.551 | 1.652.952 |
| 6 | Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 3.885.142 | 5.487.569 |
| 7 | Onnur áogn | 971.512 | 1.993.110 |
| | **Áogn til samans** | **29.057.194** | **19.851.894** |
| | | | |
| 8 | Tøkur peningur | 2.668.971 | 2.056.496 |
| | **Ogn í umferð til samans** | **31.726.165** | **21.908.390** |
| | | | |
| | **Ogn til samans** | **62.095.640** | **54.027.740** |

| Nota | SKYLDUR | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | Eginogn við ársbyrjan | 0 | 0 |
| | Mótkonta, bygningur | 20.530.047 | 21.115.910 |
| | Mótkonta, onnur materiel støðisogn | 9.839.429 | 11.003.440 |
| | Mótkonta, verkætlanin Savnsgull | 1.800.000 | 900.000 |
| | Mótkonta, upphædd á StRk. 0360 | 0 | 0 |
| | **Eginogn til samans** | **32.169.476** | **33.019.350** |
| | | | |
| | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 0 | 0 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 0 | 0 |
| 9 | Onnur skuld | 8.753.039 | 5.706.090 |
| 10 | Fremmand fígging | 21.173.125 | 15.302.300 |
| | **Stuttfreistað skuld til samans** | **29.926.164** | **21.008.390** |
| | | | |
| | **Skyldur til samans** | **62.095.640** | **54.027.740** |

Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 11)

KRINGVARP FØROYA

# Notur

| 1 | Inntøkur | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | Kringvarpsgjald | 66.986.812 | 65.750.925 |
| | Útvarpskunngerðir | 2.250.900 | 1.869.760 |
| | Gekkaspælið, netto | 4.112.658 | 5.234.916 |
| | Ískoytisveitingar | 90.000 | 130.000 |
| | Aðrar inntøkur | 704.394 | 1.864.787 |
| | **Inntøkur til samans** | **74.144.764** | **74.850.388** |

| Gekkaspælið, netto | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Inntøkur | 21.381.965 | 8.316.938 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -800.512 | -718.073 |
| Aðrar útreiðslur | -10.597.971 | -4.353.575 |
| **Nettoúrslit í árinum** | **9.983.482** | **3.245.290** |
| Harav støðlað á kontu fyri fremmanda fígging | -9.983.482 | -3.245.290 |
| Brúkt av støðlaðari upphædd frá eldri árum | 4.112.658 | 5.234.916 |
| **Gekkaspælið, tikið við sum inntøka í rakstrarroknskapinum** | **4.112.658** | **5.234.916** |

Inntøkur frá eydnuspølum verða støðlaðar sum fremmand fígging og tiknar við sum inntøkur í rakstrinum so hvørt tær verða brúktar til at fíggja rakstrarútreiðslur, íløgur o.t. Inntøkurnar frá eydnuspølum verða sostatt brúktar sum restfígging.

# Notur

| 2 | Framleiðandi deildir | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | **Aktuelt:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 13.100.363 | 12.417.932 |
| | Vørur og tænastur | 1.439.689 | 2.176.454 |
| | **Aktuelt til samans** | 14.540.052 | 14.594.387 |
| | | | |
| | **Heimasíða:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 1.736.791 | 1.279.089 |
| | Vørur og tænastur | 90.296 | 20.453 |
| | **Heimasíða til samans** | 1.827.087 | 1.299.542 |
| | | | |
| | **Starvslesandi:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 0 | 0 |
| | Vørur og tænastur | 0 | 0 |
| | **Starvslesandi til samans** | 0 | 0 |
| | | | |
| | **Mentan:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 14.142.139 | 15.062.657 |
| | Vørur og tænastur | 1.752.772 | 1.427.079 |
| | **Mentan til samans** | 15.894.911 | 16.489.736 |
| | | | |
| | **Tøknideildin (framleiðsluparturin):** | | |
| | Lønir og samsýningar | 13.292.589 | 13.706.252 |
| | Vørur og tænastur | 304.440 | 393.664 |
| | **Tøknideildin (framleiðslupartur) til samans** | 13.597.029 | 14.099.916 |
| | | | |
| | **Framleiðandi deildir til samans** | **45.859.079** | **46.483.581** |

# Notur

| 3 | Stuðlandi deildir | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | **Umsiting og felagsútreiðslur:** | | |
| | Lønir | 4.461.715 | 5.241.473 |
| | Vørur og tænastur | 2.801.663 | 1.890.486 |
| | Umsitingin til samans | 7.263.378 | 7.131.959 |
| | **Tøkni deildin (ikki framleiðslupartur):** | | |
| | Lønir og samsýningar | 6.053.336 | 6.755.221 |
| | Vørur og tænastur | 3.840.766 | 2.723.367 |
| | Samskiftiskostnaður | 666.375 | 669.860 |
| | Rakstur av bygningi | 1.904.730 | 2.117.696 |
| | Rakstur av akførum | 401.699 | 358.994 |
| | Tøkni deildin til samans | 12.866.906 | 12.625.138 |
| | **Stuðlandi deildir til samans** | **20.130.284** | **19.757.097** |

| 4 | Annar kostnaður | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | Kostnaður fyri rættindi | 4.061.302 | 4.416.544 |
| | **Annar kostnaður til samans** | **4.061.302** | **4.416.544** |

| 5 | Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | Áogn, brutto | 3.306.018 | 1.697.250 |
| | Avsett móti væntaðum tapi | -397.467 | -44.298 |
| | **Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar til samans** | **2.908.551** | **1.652.952** |

# Notur

| 6 | **Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald** | **2022** | **2021** |
|---|---|---|---|
| | Áogn, brutto | 5.058.090 | 6.553.998 |
| | Avsett móti væntaðum tapi | -1.172.948 | -1.066.429 |
| | **Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald til samans** | **3.885.142** | **5.487.569** |

| 7 | **Onnur áogn** | **2022** | **2021** |
|---|---|---|---|
| | Meirvirðisgjald | 339.147 | 495.965 |
| | Depositum | 76.082 | 76.082 |
| | Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 556.283 | 1.421.063 |
| | **Onnur áogn til samans** | **971.512** | **1.993.110** |

| 8 | **Tøkur peningur** | **2022** | **2021** |
|---|---|---|---|
| | BankNordik | 2.500.323 | 1.901.295 |
| | Betri Banki | 90.614 | 71.921 |
| | Norðoya Sparikassi | 9.698 | 9.681 |
| | Suðuroyar Sparikassi | 66.416 | 65.736 |
| | Kassapeningur | 1.920 | 7.863 |
| | **Tøkur peningur til samans** | **2.668.971** | **2.056.496** |

| 9 | **Onnur skuld** | **2022** | **2021** |
|---|---|---|---|
| | Meirvirðisgjald | 0 | 0 |
| | Skyldugar lønir | 68.920 | 0 |
| | Skyldug avspáking | 2.241.400 | 1.854.300 |
| | Skyldur í sambandi við eydnuspøl | 5.850.784 | 2.263.966 |
| | Upphavsrættargrunnur | 2.436 | 2.324 |
| | Tíðaravmarkingar | 589.499 | 1.585.500 |
| | **Onnur skuld til samans** | **8.753.039** | **5.706.090** |

# Notur

| 10 | Fremmand fígging | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | Støðlað upphædd við ársbyrjan | 15.302.300 | 17.291.927 |
| | Inntøkur frá gekkinum í árinum | 9.983.483 | 3.245.289 |
| | Brúkt upphædd í árinum - tikið við sum rakstrarinntøka | -4.112.658 | -5.234.916 |
| | **Støðlað/fremmand fígging til samans við árslok** | **21.173.125** | **15.302.300** |

## 11 Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna

Skyldug restferia frá innvinningarárinum 2021/2022 er við árslok 2022 gjørd upp til 1,0 mió.kr. (2020/2021: 1,0 mió.kr.).

## 12 Leiguskyldur

Kringvarp Føroya hevur gjørt leigusáttmála upp á 375 tkr. árliga, har uppsagnartíðin av leigumálinum er 6 mánaðir.